UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 17. mai 2023
J. nr.: 23/10426-6

Svar upp á § 52 a fyrispurning frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, um hvussu stórur partur av bruttuvinninginum tøkugjøldini hava verið seinastu 10 árini, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum, Høgna Hoydal (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningur:

1. Hvussu stórur partur av bruttovinninginum hava tøkugjøldini verið í alivinnuni seinastu 10 árini - hvørt ár sær?

Svar
Spurt verður um, hvussu stórur partur av bruttuvinninginum, tøkugjøldini hava verið í alivinnuni seinastu 10 árini, fyri hvørt árið sær.

Fyri at svara spurninginum er neyðugt at nágreina fortreytirnar fyri svarinum nærri. Talan er um samlaða bruttovinningin hjá vinnuni og ikki fyri hvørt felagið sær. Svarað verður við støði í roknskapunum hjá P/F Mowi Faroes, P/F Luna og P/F Bakkafrost Farming.

Roknskaparliga verða útreiðslur til tøkugjald trektar frá nettosøluni, áðrenn komið verður til bruttovinningin, eisini nevnt bruttoúrslitið. Harvið er tað meira rættvísandi at tosa um, hvussu stórur partur av bruttoúrslitinum uttan útreiðslur til tøkugjøld, tøkugjaldið hevur verið seinastu 10 árini. Víst verður í hesum sambandinum eisini til svar frá Fíggjamálaráðnum upp á fyrispurning nr. 52-090/2022 viðvíkjandi veiðigjøldum.

Talvan niðanfyri vísir bruttoúrslitið og bruttoúrslitið uttan útreiðslur til tøkugjøld hjá alifyritøkunum fyri árini 2012-2021. Roknskapartølini fyri 2022 eru ikki tøk enn og tí ikki við.

Lóg um loyvisgjald á alivinnu varð sett í gildi 1. januar 2014 og tískil vóru ongar tøkugjaldsinntøkur áðrenn tað.

(DKK)	2012	2013	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021
Bruttovinningur/Bruttoúrslit										
Bakkafrost Farming	205.424.003	579.248.213	467.918.489	519.672.249	995.070.848	1.074.519.795	851.300.546	1.074.919.829	605.476.682	820.182.655
Mowi Faroes	38.456.010	107.309.227	176.559.643	69.331.404	292.998.599	186.521.007	160.464.674	145.539.920	158.167.317	152.665.046
Luna	51.589.670	168.318.276	191.354.739	181.185.790	323.067.958	351.803.320	325.634.024	386.962.342	236.629.954	366.761.526
Bruttoúrslit íalt	295.469.683	854.875.716	835.832.871	770.189.443	1.611.137.405	1.612.844.122	1.337.399.244	1.607.422.091	1.000.273.953	1.339.609.227
Tøkugjald	-	-	40.793.075	23.704.962	157.907.094	158.108.285	136.360.641	139.995.535	81.813.487	196.157.071
Bruttoúrslit uttan útreiðslur til tøkugjald	295.469.683	854.875.716	876.625.946	793.894.405	1.769.044.499	1.770.952.407	1.473.759.885	1.747.417.626	1.082.087.440	1.535.766.298
Partur av bruttoúrslitinum	-	-	4,7%	3,0%	8,9%	8,9%	9,3%	8,0%	7,6%	12,8%

Í talvuni sæst, at tøkugjaldið seinastu fimm árini hevur verið millum 9,3% og 12,8% av bruttoinntøkuni.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, tann 17. mai 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður